

Bijan Zanganeh, oljumálaráðharri í Iran. Mynd: The Iran Project

# Iransku oljupumpurnar klárar at spræna olju út á heimsmarknaðin

**Jógvan Hugo Gardar**

02.08.2015 - 16:44

Oljan.fo

Í somu løtu handilsforðingarnar eru tiknar burtur, so kann Iran eftir fáum tímum økja oljuframleiðsluna við 500.000 føtum av olju um dagin, og senda tað út á heimsmarknaðin. Tað sigur oljumálaráðharrin í landinum. Sambært tíðindastovuni Reuters skal oljumálaráðharrin Bijan Zanganeh hava sagt at Iran er í gongd við at fáa uppá pláss avtalur við keyparar, ið standa klárir at keypa oljuna, so skjótt handilsforðingarnar eru burtur.

- Og vit kunnu innan eitt samdøgur frá forðingarnar eru strikaðar økja um framleiðsluna við 500.000 føt av olju, sigur hann.

Framleiðslan hjá Iran minkaði við umleið einari millión føtum av olju tá handilsforðingarnar blivu settar í verk, frá goðum fýra milliónum føtum.

Sambært Zanganeh er málið at eftir stuttari tíð skal framleiðslan upp á millum 3,8 og 3,9 milliónir føt um dagin.

Iran samdist fyrst í juli við millum annað Russland og USA um hvussu kjarnorkupolitikkurin hjá Iran skal vera í framtíðini. Eitt úrslit av avtaluni er at revsitiltøkini sum USA, ES og ST hava sett í verk móti landinum skulu strikast.